## Nýtt full-veldisblað




Ávaring! Blaðið er fylt við úrvaldum full-veldisráka", ljóðar tað á forsíðuni á nýggja Tarablaðnum, sum kom út í vikuni. Hildur ikki tað meir skaldsliga tilfarið í blaðnum er fyri smá-sárar sálir

Hóast tilfarið í løtum kundi bent á tað, er nýggja Tarablaðið ikki ein roynd at endurskapa Fregnir, sum gavst í september í fjør. At Tarablaðið hoyrir heima ytst á fullveldisvonginum er tó onki at ivast í. Flestu av greinunum eru sera atfinningarsamar mótvegis sitandi samgongu. Hartil byggir stóra temaið hesuferð á eina nýggja Gallup kanning, sum vísir, at fólk sum heild ikki taka undir við størru avgerðunum hjá samgonguni seinastu mánaðirnar.

Av øðrum greinum kunnu nevnast "Skúlaskapur í altjóða samfelagnum", har Vár í Ólavsstovu við neyvum innliti grundgevur fyri, hví ætlanin um ein skúladepil í Hovi er dømd til at miseydnast. Erla Olsen hugleiðir í greinini "Den mere kloge narrer den mindre kloge" um, hvørt tey ofta vánaligu føroysku samráðingarúrslitini við danir møguliga hanga saman við lága útbúgvingarstøðið hjá okkara landsstýrismonnum.

Á tí meir skaldsliga bógnum er millum annað ein rættiliga bersøgin hugleiðing, har føroyskur samtíðarpolitikkur verður samanborin við eina ikki sørt saftiga erotiska støðu.

Samanumtikið eitt sera snøgt blað við eini røð av væl skrivaðum og hugvekjandi greinum, sum ikki leggja fingrarnar ímillum

Í ritstjórnini á nýggja Tarablaðnum sita millum onnur John Dalsgarð og Carl Jóhan Jensen.

**ave**

# ESP bjargar mannalívum




*Elektronisku trygdarskipanirnar sum t.d. ABS, ESP hava sera stóra ávirkan á trygdina í nýggju bilunum*

**Elektroniska tøknin verður skjótt so nógv útbygd, at hon hevur fult tamarhald á bilinum og hjálpir bilføraranum undir koyring, uttan at hesin veit av tí ella merkir nakað**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tryggasti bilur á vegnum er tann, sum ongantíð verður íblandaður eitt ferðsluóhapp, og prógvini fyri at ESP (Elektronisk Stabiliserings Program) hevur bjargað nógvum mannlívum eru nú so mong, at allir nýggir bilar skuldu havt hesa skipan, sigur formaðurin í EuroNCAP, svenski professarin og trygdarserfrøðingurin Claes Tingvall. EuroNCAP testa allar nýggjar bilar, sum koma til Evropa og geva teimum upp til fimm stjørnur, alt eftir hvussu tryggir teir eru.

ESP-skipanin virkar og hjálpir bilføraranum uttan at hesin veit av tí ella nýtist at gera nakað sum helst.

ESP er eitt elektronsiskt stabiliseringsprogram, ið ger at bilurin ikki glíður út í svingum og tryggjar optimalt vegtak undir øllum umstøðum.

Í Svøríki hevur Vägverket kannað 10.000 ferðsluvanlukkur síðan 2000, og eru teir komnir til tað úrslit, at ESP og líknandi skipanir hava sera stóra ávirkan á trygdina í bilunum.

Í samband við at týska elektronikkverksmiðjan Bosch júst nú hevur hátíðarhildið at 10 ár eru liðin síðan ESP fyrstu ferð kom á marknaðin, siga teir at ESP einans er byrjanin. Í framtíðini koma nógvar skipanir at verða bygdar yvir ESP-tøknina.

> ”
> *Tryggasti bilur á vegnum er tann sum ongantíð verður íblandaður eitt ferðsluóhapp.*
>
> *Claes Tingvall, formaður í EuroNCAP*

---

Svensk kanning:

# Nýggir bilar munandi tryggari



*Svenska kanningin vísir, at stórir tungir bilar eru tryggari í ógvusligum ferðsluvanlukkum. Her eru tað tveir Saab 9-5, ið renna saman*

**At nýggju bilarnir eru tryggari enn teir gomlu undrar neyvan nakran. Kanningarnar av ferðsluvanlukkum í Svøríki seta tøl á og vísa eisini at so er**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Møguleikin fyri at yvirliva eina fersluvanlukku er níggju ferðir so stórur sum fyri 20 árum síðan. Ella við øðrum orðum er vandin fyri at doyggja í ferðsluni fallin við 90 prosentum. Nakrar av orsøkunum eru, at bilarnir eru vorðnir tryggari í allar mátar sum t.d. við trygdarkabinum, airbag, strammarum í trygdarbeltunum og tryggari setur og aktivar nakkastúttur.

Hetta stendur m.a. í kanningini sum eitt svenskt tryggingarfelag hevur gjørt av 94.000 ferðsluvanlukkum í Svøríki seinastu 20 árini. Kanningin umfatar persónbilar í teimum ymisku klassunum. Í sama tíðarskeiði er vandin fyri at blíva avlamin í ferðsluvanlukkum fallin við 25 prosentum.

Hóast kanningin vísir, at stórir tungir bilar eru tryggari í ógvusligum ferðsluvanlukkum, eru mini-bilarnir teir sum hava gjørt flestu framstig innan trygdina seinastu 20 árini. Teir tryggastu mini-bilarnir eru á hædd við miðaltalið av bilunum í tí tryggasta klassanum. Kanningin vísir eisini, at stórur munur er á teimum ymisku bilmerkjunum.